UTTAN ÚR HEIMI

## Ákærdir fyri kvinnuhandil

Rætturin í Oslo viðger í hesum døgum eitt mál, har átta menn eru ákærdir fyri mannahandil.

Teir átta menninir eru ákærdir fyri at hava noytt tvær ungar litavskar gentur til Noregs á heysti í 2001. Sambært ákæruritinum vórðu kvinnurnar illa viðfarnar, eftir at tær vóru komnar til Oslo. Tær vórðu sparkaðar, slidnar og neyðtiknar, og í tí eina førinum bleiv onur teirra noydd at standa úti í kulda í berum undirklæðum í tveir tímar. Harafturat vil ákæruvaldið vera við, at menninir noyddu kvinnurnar at arbeiða sum skøkjur.

Málið er tað fyrsta av sínum slagi í Noregi, skrivar Dagsavisen. Løgreglan hevur nýtt drúgva tíð til kanningarnar, men málið er eisini sera álvarssamt. Verða teir ákærdu funnir sekir, kunnu nakrir teirra vænta at fáa fongsul í upp til 21 ár.

– Vit eru ikki í iva um, at talan er um kvinuhandil, og at kvinnurnar vórðu fluttar til Noregs at arbeiða sum skøkjur, sigur Hans Jørgen Bender, ákæri, við Dagsavisen.

## Sleppa ikki heimaftur

Sambært danska uttanríkisráðnum hendir tað meiri enn so, at muslimskar kvinnur í Danmark sleppa ikki heimaftur, eftir at tær hava verið í Miðeystri og øðrum muslimskum londum og ferðast saman við manninum. Heldur ikki børnini sleppa aftur til Danmarkar.

Uttanríkisráðið sigur, at higartil í ár hava myndugleikarnir skrásett 20 dømi, har kvinnurnar og børnini eru ikki sloppin aftur til Danmarkar, tí menninir hava tikið ferðaskjølini frá teimum. Í fýra førum er talan um kvinnur, sum hava danskan ríkisborgararætt, fýra hava lógligt uppihaldsloyvi í Danmark, men hjá teimum tólv seinastu var uppihaldsloyvið farið úr gildi.

Uttanríkisráðið hevur fingið upplýsingarnar frá teimum donsku sendistovunum og konsulátunum. Kvinnurnar, sum ikki sleppa heimaftur, eru nú í Etiopia, Libanon, Marokko, Pakistan, Sudan, Sýrialandi og Turkalandi.

## Skulu hava eftirnavn

Myndugleikarnir í Mongolia hava gjørt av, at í framtíðini skulu landsins borgarar hava eitt eftirnavn aftur at fornavninum.

Higartil hava mongolar bara brúkt fornavn, men tann nýggja tíðin krevur, at fólk skulu eisini hava eitt eftirnavn. Fyribils hava myndugleikarnir loyvt fólki at velja sítt egna eftirnavn, og hugflognum bagir einki. Tak bara verjumálaráðharran Gurragcha. Hann er tann einasti í Mongolia, sum hevur verið úti í rúmdini, og tí hevur hann sjálvandi valt sær eftirnavnið Kosmos. Men summi hava longu fingið trupulleikar, tí tey hava ilt við at minnast, hvat eftirnavn tey hava valt, skrivar Los Angeles Times.

Myndugleikarnir hava gjørt av, at børnini skulu hava sama eftirnavn sum pápin, men tann skipanin fær so onga ávirkan fyrr enn í næsta ættarliði, tí teir, sum í dag eru pápar, hava einki eftirnavn.

## Ákærdur fyri gamalt morð

Danir eru framvegis ikki lidnir at gera upp við tað, sum hendi undir týsku hersetingini undir seinna heimsbardaga.

Ákæruvaldið í Lyngby vil vera við, at tann nú 83 ára gamli Søren Kam var við til at beina fyri blaðstjóranum Carl Henrik Clemmensen í Lyngby tann 30. august í 1943. Søren Kam er týskur ríkisborgari og býr í Týsklandi, men danska ákæruvaldið ætlar at fáa hann útflýggjaðan, so hann kann koma fyri rættin. Áheitanin kann tó ikki sendast týsku myndugleikunum, fyrr enn ein rættur hevur tikið støðu til, um grundarlag er fyri at varðhaldsfongsla mannin.

Ætlanin hjá ákæruvaldinum í Lyngby hevur elvt til orðaskifti í Danmark. Summi halda, at tað er skeivt at ákæra ein mann so langt aftan á heimsbardagan, samstundis sum tey vísa á, at verður hetta málið koyrt í rættin, eru fleiri onnur mál, sum heldur ongantíð eru avgreidd.

# Yvirgangsmenn kunnu fáa fatur á kjarnorkuvápnum

**– Heimurin er ikki fyrireikaður til eitt møguligt yvirgangsálop við kjarnorkuvápnum, men vit kunnu ikki annað enn vóna, at vit sleppa undan einum slíkum, sigur stjórin í altjóða kjarnorkustovninum**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*– Vit eru ikki fyrireikað til yvirgang við kjarnorkuvápnum, og vit kunnu ikki annað enn vóna, at vit sleppa undan tí, sigur Mohamed ElBaradei*

Mohamed ElBaradei var ein av røðarunum á einari ráðstevnu um kjarnorkutrygd í Kyrrahavinum, sum er í Sidney í Avstralia í hesum døgum. Og hann duldi ikki fyri, at vandi kann vera fyri yvirgangi við kjarnorkuvápnum.

– Spurningurin er, um vit megna at forða tí, tí vit eru ikki fyrireikað til nakað slíkt, segði Mohamed El Baradei, sum er stjóri í altjóða kjarnorkustovninum IAEA. Orð hansara minna um tað, sum amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, segði undir valstríðnum upp undir forsetavalið, tá hann segði, at verður ikki rætt atborið, kann vandi vera fyri kjarnorkuálopum á amerikanskar býir.

Avstralski uttanríkisráðharrin, Alexander Downer, segði á ráðstevnuni í Sidney, at altjóða tiltøk er tað einasta, sum kann tryggja, at yvirgangsfelagsskapir ikki fáa fatur á kjarnorkuvápnum.

Iran hevur fingið drúgva umrøðu á ráðstevnuni. USA, Bretland, Frakland og Týskland hava lagt iransku leiðsuna undir at hava ætlanir um at útvega landinum kjarnorkuvápn, men tað hevur stjórnin í Teheran avsannað. Mánadagin eydnaðist tað teimum trimum evropeisku londunum at fáa eina avtalu við Iran um betri handilsavtalur, aftur fyri at Iran gevst við at ríka uran. Eygleiðarar halda, at avtalan kann dyva spenningin ímillum USA og Iran, og á ráðstevnuni í Sidney segði Mohamed ElBaradei, at avtalan er eitt stig á røttu leiðini.

Men hann ávaraði um, at heimurin má vera á varðhaldi.

– Tað er umráðandi, at vit eru framman fyri yvirgangsmenninar, segði hann.

# Hótta við at drepa gíslar

**Teir, sum hava burturflutt trý starvsfólk hjá ST í Afganistan, hótta nú við at drepa ein av gíslunum**

GÍSLAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Afgansku gíslarænararnir kravdu í gjár, at 26 menn, sum sita fangar á amerikonsku herstøðini Guantanamo í Kuba, skulu latast leysir alt fyri eitt. Í kravboðunum stóð, at verða menninir ikki latnir leysir, verður ein av gíslunum tikin av døgum.

Teir tríggir gíslarnir, ein maður og tvær kvinnur, arbeiddu hjá ST í Afganistan. Tey eru úr Norðurírlandi, Kosovo og Filipsoyggjunum. Gíslarænararnir siga seg vera úr einum bólki, ið eitur Muslimski Herurin, og sum sigst hava sín uppruna í Taleban-rørsluni.

Afganska stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at tingast við gíslarænararnar, og teir hava somuleiðis fingið at vita, at krøv teirra verða ikki eftirlíkað, sama hvørji tey eru.



# Danskt herðaklapp til Høgna Hoydal

**Høgni Hoydal tekur tað sum ein stóran heiður at Fólkafylkingin ímóti ES í Danmark hevur givið honum tufflu-heiðurslønina**

HERÐAKLAPP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Eg taki hetta avgjørt sum ein heiður.

Høgni Hoydal tekur tað avgjørt sum eitt herðaklapp, at fólkafylkingin ímóti ES í Danmark herfyri avgjørdi at geva honum heiðursløn.

Danska fólkafylkingin ímóti ES samtykti herfyri at geva Høgna Hoydal tufflu-heiðurslønina fyri stríð hansara ímóti ES.

Men Høgni Hoydal tekur hetta ikki bara sum eitt herðaklapp til sín. Hetta er eitt herðaklapp til alla ES mótstøðuna í Føroyum, sigur hann.

Samstundis vísir hetta, at fólkafylkingin ímóti ES í Danmark hyggur út um eingjagarðarnar.

– Hetta er eisini ein stuðl til ES mótstøðuna í Føroyum sum heild, sigur hann.

Og hann kann so eisini fegnast um, at hann hevur megnað at ført eitt stríð ímóti ES, sum eisini danir hava lagt merki til.

Á fólkatingi hevur hann nógvar ferðir reist ES-málið í røðum og fyrispurningum og hetta hava danir lagt merki til.

– Tað er eisini at fegnast um, at eisini í Danmark eru tey greið yvir, at ES mótstøðan í Føroyum er intakt.

Tað lá ikki fyri hjá honum at møta upp at taka ímóti heiðurslønini, so tað mátti fastur hansara í Danmark, Annika Hoydal, gera fyri hann.

Í takkarrøðu síni vísti hann á, at tað fólkafylkingin ímóti ES var beinleiðis orsøkin til, at Føroyar ikki endaðu uppi í ES tá ið Danmark fór upp í.

Orsøkin til at vit ikki vildu fara upp í ES var fyrst og fremst tí vit vildu ikki missa rættin til at umsita okkara egna fiskiríkidømi. Og í dag er stór semja um, at vóru vit farin upp í ES við tí felags fiskivinnupolitikki, sum felagsskapurin hevur, høvdu vit havt ovurstórar trupulleikar.

Høgni Hoydal vísti á, at tað sama ger seg galdandi í íslandi, Grønlandi og í Noregi.

Sjálvur ivast hann ikki í, at tað hevði verið nógv rættari at londini í Norðuratlantshavi stóðu saman um ein felags fiskivinnupolitikk og havumhvørvispolitikk í Norðuratlantsavi.

Kortini vísti hann á, at mótstøðan ímóti ES snýr seg ikki bara um fiskirættindi. Hon snýr seg sanniliga eisini um grundleggjandi fólkaræði og sjálvur er HøgniHoydal íðin mótstøðumaður ímóti at miðsavna tað politiska og búskaparliga valdið.

– Høvdu Føroyar farið upp í ein slíkan felagsskap, høvdu vit als onga ávirkan havt yvirhøvur og búskaparliga høvdu vit enda sum ein enn fjarðari útjaðari, ið altíð fór at vera bundin atstuðuli úr ES.

Men hann ávaraði eisini um gongdina, nú Danmark skal atkvøða um eina ES-grundlóg. Við hesi grundlógini verður føroyskur og grønlendskur handilspolitikkur, uttanríkispolitikkur, verjupolitikkur, gjaldoyrapolitikkur fluttur til Brússell at verða umsita, uttan at føroyingar og grønlendingar verða spurdir.

Tað kann enda við eini merkiligari støðu, at føroyingar og grønlendingar sita eftir í Norðuratlantshavi við donskum uttanríkispolitikki, verjupolitikki, rættarpolitikki og einum donskum gjaldoyra, samstundis sum Danmark hevur flutt sín politikk á hesum økjum til ES

– Soleiðis kunnu føroyingar enda sum ein tøvd hosa, sum bæði er útjaðari í Danmark og í ES, segði Høgni Hoydal.

Sostatt er hann komin til ta niðurstøðu, at Danmark í veruleikanum er í ferð við at loysa frá Føroyum og Grønlandi.

Men ber tað til at flyta hesi málsøki til ES, so eigur tað eisini at bera til at flyta hann, til Føroyar og Grønland

– Hetta verður vit fara at stríðast fyri í Føroyum, segði hann.

# Genturnar við metsíða hárinum takka

**Systrarnar Sheila og Wivika T. Strøm á Tvøroyri standa aftur nú í Børnenes Rekordbog og Sheila nú eisini einsamøll sum tann einstaka við síðasta hárinum. Tær takka øllum stuðlum sínum, sum gjørdu ógloymandi ferðina í samband við útgávudagin møguliga**

HÁR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Í samband við útgávuna av metbókini vóru systrarnar í Danmark og har var ikki sørt gjørt burturúr teimum. Tær vitjaðu TV2 og vóru í sendingini God aften Danmark og Ekstrablaðið og okkurt lokalblað gjørdi eisini buturúr teimum báðum*

*(Mynd; D.Olsen)*

Sheila og Wivika T. Strøm á Tvøroyri standa framvegis í Børnenes Rekordbog sum systrarnar við síðasta hárinum. Í ár kom Sheila so við nýggjum meti. Hon er nú tann einstaklingur, ið hevur síðast hár.

Í samband við útgávuna av bókini vóru systrarnar í Danmark og har var ikki sørt gjørt burturúr teimum. Tær vitjaðu TV2 og vóru í sendingini God aften Danmark og Ekstrablaðið og okkurt lokalblað gjørdi eisini buturúr teimum báðum. Á einum túri á »Strøget« í Keypmannahavn vildu nakrir hárfríðkarar hava fatur í Sheilu, tí ætlanin var at seta hár hennara upp í loft og at senda metið inn til Guinnes metbókina, men hetta loyvdi ferðaætlanin hjá systrunum ikki, tí nógv skuldi gerast á stutta túrinum í Danmark.

Tær báðar ynskja nú at takka teimum stuðlum, sum gjørdu tað møguligt hjá teimum at taka lut, tá bókin kom út, og tær siga soleiðis:

Stóra tøkk til tykkara, ið stuðlaðu okkum á danmarkarferðini í samband við metbókaútgávundagin. Uttan tykkara stuðul hevði hetta verið ógjørligt. Eisini tøkk til systur okkara og svágin fyri at húsa okkum, og at tey komu við okkum til Kattegatsentrið í Grenå. Sheila setti nýtt met og er hárið nú 1,50 m.

Vit eru sera takksamar og ynskja at takka Timburhandlinum á Sandi, ommunum báðum, T.M.T, Trongisvágur, Suðuroyar Sparikassa, Vágur, P/F Klesin, Tvøroyri, C.N. Bygg, Porkeri, Alval, Tvøroyri, P/F J. Nolsøe, Tvøroyri, Gestabúðin, Tvøroyri, Samkeyp, Tvøroyri, Atlantic Airways, Vágar.

# Landsbanki Føroya er ikki ein tjóðbanki

**– Tað er einans høpi í einum tjóðbanka, um avvarðandi land hevur egið gjaldoyra. Egið gjaldoyra er ein fyritreyt fyri - við broytingum í gjaldoyrakursinum - at hava møguleika at ávirka kappingarevnini mótvegis øðrum londum. Egið gjaldoyra er somuleiðis ein fyritreyt fyri at hava møguleika at broyta rentustigið og harvið ávirka konjunkturarnar sigur Felagið hjá Peningastovunum m.a. í einum tíðindaskrivi í blaðnum í dag**

BANKAR
*Jan Müller*

Felagið sigur annars, at tað er einki høpi í, tá Landsbankin sigur, at gongdin í útlánum hjá føroyskum peningastovnum lýsir gongdina í samlaðu lánsupptøkuni í Føroyum. Føroyingar kunnu eftir vild taka upp lán hjá útlendskum peningastovnum. At hetta kemur fyri í stóran mun vita tey, sum bara hava eitt vet av innliti í peninga- og útlánsmarknaðin. Hetta sigur Felagið hjá Peningastovnunum í Føroyum í einum aftursvari til úttalilsi frá Landsbankanum herfyri.

Felagið hjá Peningastovnunum heldur fyri í tíðindaskrivi (á síðu 11 í blaðnum) at tað tí verið ógvuliga órímiligt - og púra uttan virknað - um Landsbankin kom til ta niðurstøðu, at útlánsvøksturin í Føroyum var ov stórur, og myndugleikarnir tí áløgdu føroyskum peningastovnum avmarkingar, meðan útlendskir peningastovnar ótarnaðir kundu hildið fram við útlánsvirksemi sínum í Føroyum.

Peningastovnarnir halda tað eisini vera av stórum týdningi at fáa avgjørt, um eftirlitið við føroysku peningastovnunum verður framt av Fíggjareftirlitinum, Landsbanka Føroya ella Fíggjareftirlitinum og Landsbanka Føroya í felag. Tað er neyðugt hjá peningastovunum at vita, hvønn veg teir skulu venda antennum sínum.

Felagið hjá Peningastovnunum vísir víðari á, at Landsbanki Føroya førir fram í skrivi, sum varð sent miðlunum herfyri, at tað hevði verið í andsøgn til altjóða gongdina at tryggja tjóðbankum (miðbankum) størri sjálvstøðu, um Landsbankin varð niðurlagdur sum sjálvstøðugur stovnur.

Til hetta sigur Felagið hjá Peningastovunum m.a.: »Landsbanki Føroya er ikki ein tjóðbanki. Tað er einans høpi í einum tjóðbanka, um avvarðandi land hevur egið gjaldoyra. Egið gjaldoyra er ein fyritreyt fyri - við broytingum í gjaldoyrakursinum - at hava møguleika at ávirka kappingarevnini mótvegis øðrum londum. Egið gjaldoyra er somuleiðis ein fyritreyt fyri at hava møguleika at broyta rentustigið og harvið ávirka konjunkturarnar.

Danmarks Nationalbank, ikki Landsbanki Føroya, kann ávirka peningamongdina. Talan er um sisyfosarbeiði, tá Landsbankin setur sær fyri at ávirka gjaldførið í Føroyum við annaðhvørt at flyta almenna gjaldførið til ella úr landinum. Føroysku peningastovnarnir, sum eru fullgildir luttakarar á danska peningamarknaðinum, kunnu skjótari enn snarljósið flyta líka nógvan, og meira, pening øvugtan veg sigur Felagið hjá Peningastovunum og leggur aftrat:

– Landsbanki Føroya hevur stutt og greitt ikki neyðugu amboðini til at hava møguleika at ávirka rentuna ella at føra penga- og gjaldoyrapolitikk. At Landsbankin orsakað av manglandi øðrum, og betri, uppgávum hevur sett sær fyri at hava eftirlit við føroysku peningastovnunum er ikki bara undrunarvert, tað er eisini óneyðugt stendur í skrivinum.